

# Halt summar í New York

Føroyingar hava nú møguleikan at njóta summarið í “the City, that never sleeps”, nevniliga New York. Atlantic Airways bjóðar nú føroyingum at halda summar í tí kendasta ferðamálinum í heiminum.

Atlantic Airways hevur í tvey ár nýtt høvið at bjóða føroyingum at halda summar í New York.

Við átta milliónum íbúgvum er New York kendur fyri at vera ein mentanardepil við øllum tí, sum hjartað kann ynskja sær. Hann er størsti býurin í USA, sum umboðar allar heimsins mentanir.

## Heimsins fíggjarligi høvuðsstaður

Í New York kanst tú eitt nú uppliva Manhattan, sum er tann elsti býarparturin í New York, og eisini tann, sum verður mettur at verða ein sokallaður høvuðsstaður í New York.

Manhattan er ein stórur kommersiellur, búskaparligur og mentanarligur býarpartur, sum millum annað eigur Wall Street, New York Stock Exchange og NASDAQ. Harvið dystast New York við London, um at gerast fíggjarligi høvuðsstaðurin í heiminum.

Nógvar stórar útvarpsstøðir, sjónvarpsstøðir og fjarskiftisfyritøkur hava høvuðssætið í Manhattan, eins og bókaútgevarafeløg og aðrir miðlar halda til í pulserandi stórbýnum.

## Sex and the City

Umframt mongu mentanarligur og fíggjarligu stórmaktirnar í USA, sum halda til í Manhattan, New York, so telist Manhattan eisini millum heimsins mest kendu býarpartum, sum eitt nú leggur lunnar undir kendu sjónvarpsrøðina Sex and the City.

Tað er heldur ikki uttan orsøk, at Manhattan, New York er júst býarinnar býur í hesi vælumtóktu sending. Tað er nevniliga tí, at í New York gerast dreymar til veruleika.